

## Færri ættleidd til USA í fjør

Sambært tíðindastubba á portalinum hjá FoxNews vóru tað í 2010 munandi færri børn ættleidd til USA samanborið við undanfarin ár.

Leingi hevur Guatemala verið landið, haðani flest børn vóru ættleidd, men eftir at myndugleikarnar komu fram á trupulleikar við korruptión í landinum er ættleiðing frá Guatamala nærum steðgað upp.

Tilsamans vóru 11.059 børn ættleidd til USA í 2010, harav 3.401 úr Kina, ið var landið sum ættleiddi flest børn til USA í 2010.

*www.aettleiding.fo*




***asdaUm doluptatie tie do delit lor irilisl ea faciduis atusdft praeseq***

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skulu eisini selja trygdarútgerð

**TRYGD Handlar, sum selja fýrverk, skulu nú eisini selja eitt nú trygdarbrillur**

Áki Bertholdsen

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, fer nú at broyta lógina, so at tað verður eitt krav, at tey, sum selja fýrverk, eisini skulu selja verndarbrillur og kanska aðra trygdarútgerð við.

Tað hevur hann greitt Bergtóru Høgnadóttir Joensen, løgtingskvinnu, frá.

Hon heldur ikki, at tað er rætt, at tey, sum selja fýrverk ikki mangan ikki hugsa um eisini at hava trygdarbrillur til taks.

Tað er ikki nøktandi at ganga handil úr handil eftir trygdarbrillum, men til fánýtis, tí ongar fáast til keyps.

Hon staðfesti, at hóast fýrverk hevur eina datomerking, men brillur halda sær ár um ár, var mest sum ógjørligt at fáa fatur á brillum í nøkrum handli í ár. Tey seldu bara fýrverk, men ongar brillur

Hon sigur, at hetta kann tykjast at vera eitt lítið mál, men tað halda neyvan tey, ið missa sjónina, ella fáa aðrar skaðar av fýrverki.

Hon heldur eisini, at tað er óheppið, at summi skjóta nýggjárið inn í fleiri dagar.



*– Hvussu skal eg baka við mínum barni, góði Aksel. Soleiðis spyr Eydna Skaale, mamma at einum spastiskum barni, Aksel V. Johannesen, sum fríggjadagin í Eygsjón vísti, at hann als ikki veit, hvønn tørv hesi børnini hava...*

*Eyda Skaale, mamma*



# Misti 800 mió kr

Tvær ferðir er Amagerbankin bjargaður á mállinjuni av danska ríkmanninum Karsten Ree. Nú missir hann allan partapeningin.

Tað tað gjørdist greitt, at ongin vón longur var fyri at Amagerbankin stóð til at bjarga, hevði ein persónur eina serliga orsøk at harmast. Danski ríkmaðurin, fyrrverandi eigarin av Den Blå Avis, Karsten Ree.

Tvær ferðir hevur Amagerbankin sent út neyðarkall og báðar ferðir hevur Ree svarað og sett hundraðtals milliónir í neyðstadda bankan á Amager.

Karsten Ree, ið gjørdist góður fyri 2-3 milliardir kr eftir søluni av Den Blå Avis, setti í tveimum umførum tilsamans 800 mió kr í bankan og átti sostatt 33% av tí nú kollsiglda bankanum.

Hansara hugskot var at fáa hinar partaeigararnar at hækka sín partapening, skifta leiðsluna út, og at fáa ein sunnan og væl riknan banka burturúr.

Eftir nógv stríð eydnaðist tað Karsten Ree at fáa skift alla leiðsluna út og at spræna meira partapening í tann sjúka bankan.

Nýggja leiðslan í bankanum hevur nú staðfest, at mongu tapini, serliga innan donsku bústaðarvinnuna, gera, at partapeningurin nú er burtur og Ree kann staðfesta sín part av tapinum uppá 800 mió kr. *Business-line www.bl.fo*

## Færri børn ættleidd til USA í fjør

Sambært tíðindastubba á portalinum hjá FoxNews vóru tað í 2010 munandi færri børn ættleidd til USA samanborið við undanfarin ár.

Leingi hevur Guatemala verið landið, haðani flest børn vóru ættleidd, men eftir at myndugleikarnar komu fram á trupulleikar við korruptión í landinum er ættleiðing frá Guatamala nærum steðgað upp.

Tilsamans vóru 11.059 børn ættleidd til USA í 2010, harav 3.401 úr Kina, ið var landið sum ættleiddi flest børn til USA í 2010.

*www.aettleiding.fo*




***Groth Nolsøe, sum í gjár vann heiðurin sum ársins borgari í Sandoyar sýslu***

*Mynd: sandportal.fo*

# Groth Nolsøe ársins borgari

**ÁRSINS BORGARI Í gjár varð avdúkað, at Groth Nolsøe í Dali vann sms-kappingina um at gerast ársins borgari í Sandoyar sýslu**

www.sandportal.fo

Í gjár varð avdúkað, at Groth Nolsøe í Dali vann sms-kappinginia um at gerast ársins borgari í Sandoyar sýslu.

Tummas Frank Joensen í Skúgvi, sum vann kappingina 2009 slapp at handa Groth Nolsøe blómur og eina klokku úr gróti, ið er gjørd á Grótvirkinum í Skopun. Hann fekk eina ektaða gávu gjørd úr tilfari úr Sandoynni við áskrift Ársins Sandoyingur 2010.

Tummas Frank segði undir handanini, at tað er ongin loyna, at Groth hevur heiðurin uppibornan um at gerast Ársins borgari í Sandoyar sýslu 2010. Groth hevur síðani 1973 verið virkin í Sandoyar Sýslu Bjargingarfelag. Hann hevur brent fyri, at bjargingarfelagið fær egin høli, og herfyri varð planerað fyri høllina á Sandi. Tað vóru ymiskar meiningar, hvar í oynni bjargingarhøllin skuldi byggjast, men her var Groth avgjørdur. Rættast var at byggja hana á Sandi, tí Sandur liggur mitt í oynni, segði Groth at enda.